| | TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>22. juni 2007 | Blað nr.:<br>**7097** |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **22. juni 2007**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **117/07-117/07**

**Fundur byrjaður:** **Kl. 17.05**
**Fundur lokin:** **Kl. 17.20**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

**VIÐ LUTTØKU AV:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Leivur Hansen |
| Kári Árting | Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen |
| Elin Lindenskov | Annika Olsen | Bjarti Mohr |
| Beate L. Samuelsen | Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen |
| Jan Christiansen | | |

**LUTTÓK EISINI:**

**LUTTÓK IKKI:**
Høgni Mikkelsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Karin Jacobsen

**117/07** **2007-1969/3 SG**

**Mál um fyribilshølir til Tórshavnar Kommunuskúla**.

Síðani mars hevur eingin skúlagongd verið í Gamla Realskúlanum, vegna vantandi brunatrygd og ov vánaligar umstøður yvirhøvur. M.a. eru hølini ov smá til undirvísing umframt, at Gamli Realskúlin ikki hevur grundleggjandi umstøður, so sum toilett og annað.

Ætlanin er í august 2007 at byrja arbeiðið at gera ein heildarætlan fyri Tórshavnar Kommunuskúla, sum skal gjøgnumførast komandi árini, so plásstrupulleikar verða nøktaðir.

Meðan Tórshavnar Kommunuskúli verður umvældur er neyðugt at útvega sær fyribils skúlahølir at hýsa næmingunum næsta skúlaár, sum byrjar hálvan august, so plásstrupulleikarnir verða nøktaðir.

Ein ætlan er gjørd fyri, hvussu teir mongu skúlaflokkarnir kunnu hýsast næsta skúlaár, har fyribils skúlahølir eru ein partur av ætlanini.

Metti kostnaðurin fyri fýra undirvísingarhølir 2,5 mill. kr. + innbúgv kr. 260.000,00 v/ MVG.

Eisini er neyðugt at útvega fyribils skúlahøli til køksfrálæru og handarbeiðið. Metti kostnaðurin fyri stovuna er kr. 1.800.000,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at keypa fimm fyribils skúlastovur og játta kr. 4.550.000,00 av íløgum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 22. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur ikki undir við málinum.

**Býráðið 22. juni 2007:** Samtykt við 11 atkvøður fyri og ongari ímóti, at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjarti Mohr, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Beate L. Samuelsen, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen, Leivur Hansen, Annika Olsen, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.